**UTTAN ÚR HEIMI**

## CIA var ikki uppií

Myndugleikarnir í Venesuela vilja vera við, at amerikanska fregnartænastan CIA var uppií, tá andstøðan herfyri royndi at fella landsins forseta, Hugo Chavez. Varaforsetin í Venesuela hevur sagt, at CIA hjálpti andstøðuni, og tað sama søgdu tveir tjóðartingslimir hósdagin.

Amerikanski sendiharrin í Venesuela, Charles Shapiro, hevur víst skuldsetingunum aftur. Hann sigur tær vera tann bera heilaspuna, og tað sama søgdu tríggir kongresslimir, sum í vikuni vóru í Caracas og tosaðu við Hugo Chavez. Ein teirra, demokraturin William Delhunt, viðgekk, at CIA hevur viðvirkað til at fella stjórnir í Latínamerika fyrr, men tann tíðin er farin, segði hann.

Viðurskiftini millum USA og Venesuela hava verið spent, síðani Hugo Chavez gjørdist forseti í 1998. Andstøðan hevur fleiri ferðir roynt at fella hann, og nú roynir hon at fáa eina fólkaatkvøðu um forsetan til várs.

## Kanna trygdina hjá politikarum

Morðið á svenska uttanríkisráðharran, Onnu Lindh, hevur fingið norsku løgregluna at vísa trygdini hjá landsins fremstu politikarum nógv størri ans enn higartil. Tí hevur tann serliga trygdarløgreglan gjørt av at tosa við hvønn einstakan politikara, men løgreglan vil ikki siga, hvat hon ætlar.

Formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Jens Stoltenberg, sigur við norska útvarpið, at svenska løgreglan undirmetti eftir øllum at døma vandan, sum Anna Lindh var í upp undir fólkaatkvøðuna um evruna. Hann sigur, at hetta eigur at geva øðrum politikarum nakað at hugsa um, tí politikararnir mugu hava álit á metingunum hjá løgregluni. Tí fegnast hann um stigið hjá trygdarløgregluni.

Jens Stoltenberg sigur, at hann hevur onkuntíð kent seg illa, men at hann hevur ongantíð kent seg hóttan.

## Eiga at sleppa til Kuba

Ein meiriluti í amerikanska Senatinum hevur samtykt, at amerikanarar eiga at sleppa til Kuba at ferðast. Tað hevur annars verið bannað í meiri enn 40 ár. 59 senatorar atkvøddu fyri uppskotinum og 36 ímóti.

Umboðsmannatingið hevur eisini samtykt, at amerikanarareiga at sleppa til Kuba at ferðast, hava teir hug til tess. Republikanski flokkurin hjá George W. Bush, forseta hevur meiriluta bæði í Senatinum og í Umboðsmannatinginum, og atkvøðugreiðslurnar vísa, at Bush og floksfelagarnir fraga ikki eina línu í hesum spurninginum. Tí forsetin hevur gjørt greitt, at hann fer at nýta sýtingarrættin ímóti samtyktini.

Bush hevur tvørturímóti givið myndugleikunum um at herða eftirlitið við ferðabanninum, og hann hevur lovað at revsa teir amerikanarar, sum fara til Kuba kortini. Sambært lógini kunnu fólk fáa upp í tvær milliónir krónur í bót og upp í tíggju ára fongsul, bróta tey bannið ímóti at fara til Kuba at ferðast. Men nógvir amerikanarar velja at fara til grannalondini Kanada ella Meksiko fyrst og haðani til Kuba.

# Ísurin í Arktis bráðnar skjótari enn hildið

**Amerikanska rúmdarumsitingin NASA ávarar nú um, at ísurin við Norðpólin bráðnar ógvuliga skjótt. Okkurt má gerast, siga granskararnir.**

**UMHVØRVI**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Tað er í ferð viðat henda júst nú, og vit hava ikki stundir til at bíða longur eftir tekniskum loysnum, sigur Savid Rind á granskingarstøðini, sum NASA hevur í New York.

Savid Rind sigur, at fylgisveinamyndirnar av økinum við Norðpólin vísa, at ein broyting er á veg. Ísøkið er minkað eitt prosent um árið síðani 1980 og hevur ongantíð verið so lítiðsum nú.

Amerikonsku granskararnir siga, at broytingin við Norðpólin kemst uttan iva av tí veksandi hitanum á Jørðini, og teir siga seg vera serliga stúrnar, tí broytingin í Arktis ger, at tað verður uppaftur heitari á Jørðini, og teir tosa tí um eina ónda ringrás.

– Kavi og havísur virka sum endurskyn og senda tí orkuna frá Sólini út aftur í rúmdina. Tá ísurin minkar, verður minni sólorka send útaftur, og tí verður tað heitari á Jørðini, sigur Josefino Comino, sum er granskari hjá NASA.

Í september boðaðu amerikanskir og kanadiskir granskarar frá, at tann størsti jøkulin í Arktis, tann 3000 ára gamli Ward Hunt-jøkulin úti fyri Ellesmere Island í ein útnyrðing úr Grønlandi, er í ferð við at fara í upployѕn. Jøkulin er longu farin í tvíningar, og partar av honum eru farnir út í Beaufort-havið norðan fyri kanada og Alaska.

# Angelina Jolie fekk ST-virðisløn



*Tað var Nana Annan (høgrumegin) kona ST-aðalskrivaran, Kofi Annan, sum handaði Angelinu Jolie virðislønina*

**Amerikanska filmskvinnan fekk virðisløn fyri arbeiði sítt at vísa heiminum á trupulleikarnar hjá flóttafólki.**

**VIRÐISLØN**
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Angelina Jolie hevur leingi virkað fyri at kunna altjóða samfelagið um arbeiðið hjá ST-flóttafólkastovninum UNHCR, og í vikuni fekk hon ta nýstovnaðu virðislønina "Sergio Vieira de Mello Citizen of the World"-virðislønina. Virðislønin hevur fingið navn eftir brasilska diplomatinum Sergio Vieira de Mello, sum doyði í einari bumbuatsókn at ST-skrivstovuni í Bagdad í august. Hann var leiðari á skrivstovuni, og 23 av hansara starvsfólkum doyðu eisini í atsóknini.

Í grundgevingunum fyri at geva Angelinu Jolie virðislønina verður sagt, at hon hevur víst almenninginum á trupulleikarnar hjá flóttafólki og á tann hátt fingið heimssamfelagið at hjálpa teimum.

Sjálv hevur Angelina Jolie givið UNHCR 100.000 dollarar burtur av inntøkunum frá filminum "Beyond Borders", sum júst snýr seg um flóttafólk og neyðhjálpararbeiði. Hon hevur eisini gjørt av, at UNHCR skal fáa allar inntøkurnar av einari bók, sum hon hevur skrivað um arbeiði sítt við flóttafólki. Bókin kemur út í næstum.

Tann 28 ára gamla filmsstjørnan, sum hevur ættleitt ein smádrong úr Kambodja, hevur júst skrivað nýggjan tvey ára sáttmála við ST.



# Børn í Klaksvík vitja Trøllapætur og ommuna

**Fríggjadagin í farnu viku vóru børn úr barnagarðinum Mylnuhúsið í Klaksvík á vitjan hjá Trøllapæturi og ommuni. Eitt upplivilsi, sum tey seint fara at gloyma, kann sigast**

**VITJAN**
*Joan Brockie/Sem Johnsson*
*starvsnæmingar*



*Børnini í Mylnuhúsinum í Klaksvík vóru ein dagin herfyri og vitjaðu Trøllapætur og ommuna*

Børnini á barnagarðinum, Mylnuhúsið hava leingi tosað um at fara til smáttuna hjá Trøllapæturi og ommuni. Eftir fleiri miseydnaðar roundir, har hvørgin var inni, eydnaðist tað teimun loksins seinasta fríggjadag. Kl. 10:30 var farið frá barnagarðinum. Lagið var gott, og børnini vóru sera spent at vita, um Trøllapætur og omman mundu vera inni hesuferð.
Tey komu til smáttuna sum lá millum tveir stórar steinar nokk so langt uppi í haganum. Tá ið tey komu nærri, sóu tey Trøllapætur og ommuna koma undan steinunum. Børnini runnu ímóti teimum, men nøkur vóru heldur bilsin. Ein genta vildi so fegin sleppa at syngja "Trøllapætur sangin". Og Trøllapætur var ikki seinur at tríva í, og so sungu tey øll tann vælkenda og vældámda sangin um Trøllapætur

### Óføra stuttligt

Tey sungu, prátaðu og stuttleikaðu sær óføra væl. Men alt fær ein enda.Og eisini henda vitjan hjá Trøllapætur og ommuni, so Trøllapætur greiddi teimum frá, at hann og omman máttu fara at keypa inn. Og tað var gjørt við stíli í. Onki við at brúka bil ella motorsúkklu, sum omman jú so val dámar. Nei ein tyrla kom ímóti teimum, sum skuldi flúgva tey til Havnar. Øll børnini veittraðu til tey, tá tey fóru.

6 starvsfólk og 15 børn fóru á vitjan hjá Trøllapætur og ommuni. Tey vóru øll um 3-6 ára aldur. Hetta var nakað, sum tey seint munnu fara at gloyma.

# Stórt tiltak á Giljanesi sunnudagin

**Sandavágs Ítróttarfelag skipar sunnudagin fyri stórum tiltaki á Giljanesi. Á skránni verður millum annað eydnuhjól, andlitsmáling, undirhald av ymsum slagi til børn og vaksin, eins og Angela og M'as Bluesband fer at undirhalda**

**TILTAK**
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Árliga Giljanestiltakið hjá Sandavágs Ítróttarfelag verður hildið sunnudagin í ítrótarhøllini á Giljanesi*

**Sandavági:**
Tað árliga Giljanestiltakið hjá Sandavágs Ítróttarfelag verður í ítróttarhøllini á Giljanesi sunnudagin. Byrjað verður klokkan 16.00 seinnapartin, sigur SÍF í tíðindaskrivi.

Tá latið verður upp klokkan 16.00 fer Angela at undirhalda fyri børnum í ítrótarhøllini.

Beint eftir, at Angela er liðug, verður meira til børnini. Tá sleppa tey at mála sær andlitið og flætta sær perlur í hárið og annað áhugavert. Her verður eitt lítið gjald tikið fyri tað tilfarð, brúkt verður til perlur og tílíkt, sum fer til flættingina, siga fyrireikararnir. Annars eru tiltøkini ókeypis, eins og tað er ókeypis at koma inn í høllina sunnudagin.

Samstundis, sum Angela undirheldur, byrjar eisini mattombola, fiskibrunnur og matsølan, sum vanliga plagar at vera á slíkum tiltaki, er eisini tá.

Hálvan tíma seinni bryjar stóra eydnuhjólið í høllini, eins og talvkapping eisini verður sett í gongd klokkan hálvgum fimm.

Men ikki bara tey, sum telva, sleppa at royna seg í kapping á Giljanesi sunnudagin. Eisini ein sjavskapping verður hildin í høllini í samband við tiltakið.

Ymsar framsýningar verða eisini í høllini. Eitt nú fara fólk at fáa høvið at síggja ymisk húsdjór, sum kom at vitja í høllini.

Fjalltíð er, ella við at vera liðug, og nógvir mans hava gingið við stavi í haganum um dagarnar. Nógvir teirra eru heil meistaraverk, og ætlanin er sýna fram nakrar slíkar fjallstavar á Giljanesi sunnudagin. Onkur er eisini, sum er rættiliga gamal, siga tey, sum skipa fyri.

Tað ber eisini til at sleppa at royna styrki á Giljanesi sunnudagin. Klokkan 17 veður kapping í sumoglíming, og tað skal, eftir sum sagt verður frá, vera rættiliga undirhaldandi. Søgan sigur tó einki um, hvørt tað eru rættiligir japanskir sumoglímarar, sum komnir eru hendanveg at bjóða vágafólki og føroyingum annars av.

Klokkan hálvgum átta fer tað kenda M'as Bluesband á pallin at undirhalda. Emma er ættað vestaneftir, og hon er altið sera væluppløgd, tá hon syngur í Vágum, so tað man eisini fara at verða hesaferð, siga tey í Sandavágs Ítróttarfelag.

Lutaseðlasøla verður alla tíðina, meðan tiltakið varar, og høvuðsvinningurin er ein vikuskiftisferð fyri tvey til Danmarkar við Maersk Air. Drigið verður, tá tiltakið endar.